FALDARI 1

# H71

2016 2017

HEIMA Í HOYVÍK



FTZ DEILDIN

## H71 v TEAM KLAKSVÍK

HOYVÍKSHØLLIN SUNNUDAGIN **18. SEPTEMBER** 2016 KL.**16.00**

Auto Service
BONUS er billigari!
J&K
TRYGD
P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · N. Finsensgøta 5 · Postsmoga 268 · Tlf. 31 14 03
ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI

# NÝTT KAPPINGARÁR

## TYGUM SITA NÚ VIÐ FYRSTA FALDARANUM HJÁ H71 FYRI LEIKÁRIÐ 2016/17 Í HENDI OG ERU VIT UM AT SETA SPÓNIN Í GREYTIN FYRI KAPPINGINI Í ÁR

Tað skerst ikki burtur, at farna leikár var framúr fyri H71. Vit at kalla volaðu í manshondbólti við at vinna allar steypakappingarnar hjá monnum og allar landskappingar, uttan tvær, har vit fingu silvur. Í kvinnudeildini hepnaðist eisini væl og vóru vit í tveimum steypafinalum og vunnu tvey føroyameistaraheiti í gentudeildini. So vit hava nógv at forsvara hetta kappingarár, er ætlanin at verja borg. Sjálvsagt verður trupult at endurtaka hetta bragd (og gera vit tað helst heldur ikki), men vilji skal altíð vera tilstaðar at gera sítt besta og at røkka hægstu tindum og so má tíðin bert vísa hvussu leikur fer.

Annars er ikki smávegis skifti farið fram í leiðslu felagsins. Formansskapur (ella forkvinnuskapur) felagsins seinastu 10, myndaður av Sunnevu Jacobsen og Gunn Ellefsen, takkaði fyri seg á aðalfundi felagsins í august og vóru í teirra stað valdar Anna Dam og Bergtóra Høgnadóttir. Eisini hava venjaratoymið hjá fremsta mansliði felagsins seinastu mongu árini, Petur Mittún og Halgir Dahl Olesen, valt at taka ein steðg og eru í teirra stað settir Sonni D.V. Larsen og Mark Lauger-Marcher.

Hvat nevndarformansskapinum viðvíkur, so kann ikki sigast, at hetta er nakað siðaskifti, tá fráfarandi og komandi formansskapir saman við øðrum góðum kreftum saman hava rikið nevndararbeiðið felagsins seinastu árini, so her verður neyvan nøkur stórvegis broyting í.




***Gunn tekur við vali sum forkvinna í HSF á aðalfundi 11. juni 2016.***

*Framhald á síðu 4*

H71

**Anna Dam**, forkvinna, tel. 519082
**Bergtóra Høgnadóttir**, næstforkv., tel. 286011
**Ann-Mari B. Mouritsen**, tel. 214452
**Emy Sólvitsdóttir**, tel. 513769
**René Dahl Olesen**, tel. 235930
**Janet Fríða Johannesen**, tel. 212211
**Símun Poulsen**, tel. 517220
**Erland Jensen**, tel. 243534

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Bergtóra Høgnadóttir
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent


NordikSOLO 18+
Við NordikSOLO ert tú flúgvandi
BANKNORDIK
Niður at lesa? Ella hevur babba bara blakað teg úr reiðrinum? Tú hevur brúk fyri NordikSolo! Tú fært kort, avsláttur, ókeypis ditt og datt og onkran at sparra við, tá tú ivast. Um tú ert í Føroyum, Keypmannahavn, Aarhus, Nuuk ella í Odense, tað er eitt feitt. BankNordik er har, tá tú fert Solo.
www.banknordik.fo/utisetar
* NordikSolo gevur tær hvørki, veingir, lasaraeygu ella „større pakka“.
SENDISTOVAN



Sigast má, at nevndararbeiðið hevur verið fyrimyndarligt seinastu nógvu árini, so har treingir sanniliga heldur ikki til nakrar størri broytingar. Kann nevndin halda áfram við góða, savnandi og mennandi arbeiði sínum, so er einki at ivast í, at H71 framhaldandi fer at mennast og fjølgast. Sunneva og Gunn hava verið felagnum ógvuliga dyggar og hava lagt lív og sál í at reka felagið og hava gjørt tað á fyrimyndarligan hátt. Tær vóru valdar eftir at H71 komu aftur av hondbóltsferð í Dronninglund í 2006 og hava staðið á odda fyri einum menningararbeiði, ið neyvan hevur sæð sín líka í føroyska hondbóltsheiminum yvirhøvur. Vit takka teimum fyri hollan stuðul og ugga okkum við, at tær neyvan eru so langt burturi, og vera helst við til at mynda karmarnar um felagið mong ár afturat, men nú bara ikki við evstu ábyrgdini (í øllum førum fyri eina tíð).

Hvat venjaraskiftinum viðvíkur, so verður spennandi at síggja, hvussu hetta fer at spæla av. Petur og Halgir hava gjørt eitt gott arbeiði sum venjaratoymi fyri fremsta lið seinastu trý árini og hava teir ført fremsta lið felagsins til tvær FM finalur (ið vit tíverri hava tapt ) og eini steypafinalu (sum vit vunnu ). Mark er gamal í garði og ivast vit ikki í, at hann er ein fongur sum venjari, bæði tá um tað leikliga og um tað sosiala ræður. Sonni er nýggjur í felagnum, men hevur sanniliga víst seg at vera góður venjari, fyrsta mánaðin hann hevur haft fremsta manslið undir hond. Vit hava ein spennandi hóp við nógvum góðum ungum evnaríkum kreftum, umframt at eldra gardan heldur áfram og er fjølgað síðani summarsteðgin, nú Bogi Davidsen hevur valt at halda áfram í lestri her heima á landi og Dánjal Torgarð hevur fingið arbeiði í Føroyum hetta kappingarár. Eisini skilst at menn í heilt eldar endanum eru farnir at ressast og óváttaði tíðindi vilja vera við, at Jens á Skipagøtu er farin at pussa dustið av málmansskónum aftur (tað tekur nokk sína tíð havandi í huga at hann nýtir nr. 49 í skóm).

Hvussu er og ikki, so er hópurin hjá fremsta liði stórur og spennandi, og hóast vit ikki skuldu rokkið finalunum í lands- og steypakappingini, so ivist eg ikki í, at vit hava tilfar til at liggja frammaliga í hesum kappingum. Eitt steyp hava vit so longu fingið til høldar í ár og tað var tá fremsta manslið sum vinnarar av steypakappingini í fjør vann 23 – 18 á føroyameistarunum frá í fjør úr Vestmanna í Super-Cup finaluni, ið Lions skipaði fyri miðan august.

Men hvussu annars fer at ganga, er ilt at siga. Livst so spyrst.


XL BYG®
TÓRSHAVN
TIMBURHANDIL - BYGGIMARKNAÐUR
og nú eisini
XL BYG®
HANDVERKARABÚÐ
Opið
Mán - frí 08.00 - 17.00
Leygard. 09.00 - 13.00



Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
NEMA
SENDISTOVAN




Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!
SENDISTOVAN

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F **Hjá Fróða**

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

**Kaj Andreasen & Co**
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum



TIT HAVA TØRVIN
VIT ERU VEITARIN.
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

fk




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO


Dekk
- sjálvandi frá Bilrøkt!
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


LEASA MEG
PRIVAT LEASING FRÁ REYNI SERVICE
TOYOTA
3
ÁRA SERVICE PAKKI
YARIS HYBRID
YARIS HYBRID
Einans 3.640,- um mánaðin!
TØRVAR IKKI LØÐING
Við Yaris all in fært tú alt við: Tá er eisini trygging, vektgjald og dekk íroknað. Allir prísir eru við mvg. Eitt stovningargjald á 20.000 kr., eitt fast mánaðargjald og nýggjan bil 3. hvørt ár. Og vit taka okkum av øllum viðlíkahaldi. Sí treytir á reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Umhvørvisviðurkent ISO 14001 virki

vistir.fo
haraldsen



trygging.fo



# Tryggja **teg** og **tíni kæru**

Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.





Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna. Hon tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum.

**Set teg í samband við okkum og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR



©NUDLAVIRKIÐ

# Ætlar tú at selja tíni hús í Hoyvík ?

## – vit hava keyparar, ið bíða

Niels Finsensgøta 37 | Tórshavn | Tel 348 900 | inni@inni.fo | inni.fo

INNI

## SUNNEVA JAKOBSEN:

# HOYVÍK ÁÐRENN OG HOYVÍK AFTANÁ

**KAPPINGARÁRIÐ, SUM NÚ ER BYRJAÐ, ER TAÐ FYRSTA Í 10 ÁR UTTAN SUNNEVU VIÐ RÓÐRIÐ. SÍÐANI NOVEMBER 2006 HEVUR HON NEVNILIGA VERIÐ FORKVINNA Í H71. NÚ ER HON FARIN ÚR NEVNDINI, MEN ÆTLAR SÆR TÓ TÍBETUR IKKI AT SLEPPA FELAGNUM HEILT**

– Eg veit, at felagið er í góðum hondum, og tí er kenslan góð at gevast nú eftir so nógv ár, sigur Sunneva.

Nú gleðir hon seg til at fáa betri stundir til frítíðarítriv sum joga og handarbeiði. Og so fer hon eisini at syngja í kóri!

Sunneva Jakobsen er ættað úr Dali. Hon er gift Dánjali, sum er úr Klaksvík. Seinastu 24 árini hava tey búð í Hoyvík. Íðan, eru tey so ikki hoyvíkingar?

– Eg plagi at siga, at eg eri úr Dali og búgvi í Hoyvík, sigur Sunneva. Dalbingur í Hoyvík, meðni.

Í november í 1992 fluttu Sunneva og Dánjal í nýggj hús í Andrassargøtu í Hoyvík.

Fríðrikur, eldri sonurin, spældi við D14 í 2006, og liðið fór tað summarið til Dronninglund í Danmark at kappast. Har vóru nógv foreldur við, sigur Sunneva, og túrurin var góður.

Meðan tey vóru burturi, varð tosað um, at H71 skuldi hava nýggja nevnd. At hini, sum vóru við, hava lagt til merkis hesa skilakonu, skilst. Ein morgunin, Sunneva kom spákandi framvið einum av kampingvognunum, tey búðu í, sat Bjørg Djurhuus og sólaði sær uttanfyri ein av vognunum. Hon rópti smílandi eftir Sunnevu:

– Har fer nýggja forkvinnan í H71!

Sunneva undrast, hvaðani hetta mundi stava. Men onkrar tankar hava tey so gjørt sær, tí stutt eftir ringdi Petur Even. Ørindini vóru at fáa hana í nevndina í H71.



***Sunneva við monnunum í sínum livi. Teir fara nú at síggja hana eitt sindur meira.***

Tey avtalaðu, at heimkomin skuldu tey øll møtast í Hoyvíkshøllini. Tey stóðu í garðinum og prátaðu, minnist Sunneva.

– Vit skrivaðu undir, og so vóru vit í nevndini.

Síðani fóru tey í H71 hølini at skipa nevndina. Formaður skuldi veljast, og Gunn, sum eisini júst var komin í nevndina, hevur ongantíð verið ráðaleys:

– Tað er uppá tíðina við einum kvinnuligum formanni, og eg skjóti Sunnevu upp!

### VALD FORKVINNA

Sunneva sigur, at júst um hetta mundið tørvaði henni nýggjar avbjóðingar í lívinum. Hon hevði í grundini stutt frammanundan lovað sær sjálvari, at hon skuldi taka av fyrstu avbjóðing, sum kom framvið. So hvat skuldi hon gera, annað enn at taka av.

*Framhald á síðu 14*

– Eg skal viðganga, at eg visti ikki nógv um hondbólt, og visti faktisk ikki rættiliga, hvat H71 var, sigur Sunneva nú, 10 ár seinni, og flennir við tankan.

Eftir henda fyrsta fundin kom hon heim til Dánjal, sum spurdi, hvussu fundurin gekk.

– Jú, hann gekk fínt, og nú eri eg forkvinna í H71, var svarið.

Dánjal fekk ein lítlan skelk, men hevur síðani vant seg við rolluna sum maður forkvinnuna – ella sum formansfrúa, sum honum dámar at kalla seg.



*Joga er eitt av frítíðarítrivunum, sum betri stundir nú eru til.*



*Hilmar Leon skal pyntast.*

## EITT FELAG Í MENNING OG VØKSTRI

Tað, Sunneva ikki visti um hondbólt og um H71 tá, veit hon so ríkiliga nú, 10 ár seinni.

Felagið var 30 ára gamalt, tá Sunneva tók við og hevði 100 aktivar limir. Nú eru 400 aktivir limir, og ein slíkur vøkstur krevur, at felagið fylgir við og kann taka ímóti teimum børnum, sum leggjast afturat. Ein tann største avbjóðingin er at kunna bjóða øllum sama, góða tilboð. Hetta setir krøv til hølisviðurskifti, venjarar og onnur hjálparfólk.

Sum forkvinna hevur Sunneva staðið á odda, men hon leggur dent á, at einsamøll gert tú einki. At hava gott fólk afturat sær hevur alt at siga, heldur hon, og ber øllum í nevndini tøkk fyri tað. Uttan at taka nakað frá hinum, nevnir hon, at serliga Anna og Gunn hava veitt henni hollan stuðul øll árini.

– At hava havt Gunn sum næstforkvinnu og so Onnu afturat hevur týtt ómetaliga nógv og tað eri eg teimum so takksom fyri!

Fráfarna forkvinnan sigur, at hesi árini hava verið lærurík og hon heldur tað vera eitt fantastiskt og innihaldsríkt arbeiði at sleppa at vera við til at aktivera so nógv børn og ungdómar.

Eftirsum nevndin í H71 í stóran mun er involverað í alt arbeiðið í felagnum, kann tað gerast strævið viðhvørt. Millum annað tí eru viðtøkurnar broyttar nú, so til ber at vaksa um nevndina, so tey eru fleiri um uppgávurnar. Nú kunnu tey vera tíggju í mun til fimm, sum tey vóru áður. Núverandi nevnd telur tó átta limir.

Hondbólturin hevur nógv at siga fyri hoyvíkingar og fyri Hoyvíkina sum bygd. At Hondbóltssambandið so eisini ger eitt stórt arbeiði at menna ungdómsarbeiðið og at seta fokus á hondbóltin ger tað uppaftur stuttligari og er eisini ein gularót hjá teimum ungu, sigur Sunneva.

## TRIVNAÐUR STØRSTAN TÝDNING

Tey, sum løgdu til merkis úrslitini seinast, steypafinalurnar vórðu leiktar, vita , at tað gongur strúkandi hjá H71 í mun til kappingarúrslit.

Tað prógvar alt gullið, sum drigið varð til bygdar. Men hvør er uppskriftin? Hví heldur Sunneva, tað bar til hjá H71 at vinna so nógv í fjør?

– Orsøkin er tað vælskipaða arbeiðið fyri, at børnini fáa ta venjing, teimum tørvar. Vit kunnu ikki einans hugsa um fremsta liðið. Fyri nøkrum árum síðani settu vit til dømis høvuðsungdómsvenjara í starv. Hetta vísti seg at gerast ein ómetaliga góð íløga. Í H71 leggja vit eisini dent á at hava vaksnar ungdómsvenjarar til allar deildir. Á henda hátt byggja vit felagið upp. Teir vaksnu leikararnir taka ábyrgd av teimum smáu, og tað er rørandi at síggja, hvussu tey smáu og yngru afturfyri síggja upp til vaksnu leikararnar, sigur hon.

– Eitt gott felag er eitt felag, har børn og vaksin trívast. So kemur restin av sær sjálvum, sigur hon, sum hevur havt ábyrgd av júst hesum seinastu tíggju árini.

*Framhald á síðu 16*

# FOKUS 18:29

## Lætt og stuttligt



Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

AnniJanni

## 188-PARADISE OYÐIN ANNAÐHVØRT SUMMAR

Nógvar stuttligar løtur hava verið. Venjingarlegur, har nevndin hevur verið við og m.a. staðið fyri at matgera. At vera forkvinna hevur verið stórur partur av sosiala lívinum hjá Sunnevu, eins og Dánjali og dreingjunum. Til nógv tiltøk eru makar og børn við, og eg haldi, vit duga væl at hugna okkum í H71, sigur Sunneva

Annaðhvørt ár fer hópin av liðum til Svøríkis at luttaka í Partille Cup og Sunneva heldur tað vera ómetaliga stuttligt og hugaligt at síggja, hvussu stórt tað tiltakið er blivið. Okkurt árið eru 350 hoyvíkingar farnir avstað.

Onkur hevur í skemti sagt, at skalt tú stjala nakað í Føroyum, er tað lættast at gera tað í Hoyvík, meðan Partille Cup er!

## GÓÐ INTEGRATIÓN

Sunneva sigur, at tað hevur verið læruríkt og gevandi at vera forkvinna í einum felag, sum H71, og hon hevur tikið tær avbjóðingar, sum hava verið. Tú møtir einari rúgvu av fólki, og kemur at kenna nógv nýggj fólk og nógv ymisk fólk.

– Vit hava fingið so ómetaliga nógv góð vinfólk gjøgnum H71, fegnast Sunneva um.

Eftirsum hvørki Sunneva ella Dánjal eru uppvaksin í Hoyvík, men vaksin hava sett búgv her, er bæði stuttligt og týdningarmikið at koma í samband við fólkið í nýggju heimbygdini. So greiðu boðini frá Sunnevu til onnur í somu støðu eru:

– Vilt tú kenna Hoyvíkina betur og vilt tú fegin uppí ein góðan felagsskap, so er H71 rætta staðið!

## FAMILJUPROJEKT

At vera forkvinna í einum so stórum felagi, krevur sína kvinnu. Tí hevur tað nógv at siga, at familjan er við uppá tað.

– Eg skal ikki siga, at Dánjal altíð hevur verið so ovurfegin, tá eg eri komin seint heim av fundi. Men eftirsum hann jú eisini er blivin H71'ari um ein háls, hevur tað borið til, sigur Sunneva.

Dreingirnir, Fríðrikur og Hilmar Leon, hava sama tokka til felagið. Og forkvinna ella ikki: Familjan Jakobsen fer framvegis at vera millum áskoðararnar tá besta liðið spælir, tí Hilmar Leon er eitt satt stjørnuskot á liðnum.

Áhugin í familjuni annars fyri felagnum er eisini stórur, tí sjálvt í Dali spyrja tey, hvussu gongur í H71, frøist Sunneva um.



***Ein av uppgávunum hjá forkvinnuni er at fáa góðar leikarar til felagið. Her er tað Peter Krog***

## NÚ SKAL SYNGJAST ANNAÐ LAG

Nú verða nógvir tímar tøkir hvønn dag hjá Sunnevu , sum áður vórðu lagdir í nevndararbeiðið. Tó væntar hon als ikki, tað verður nakar trupulleiki at finna okkurt at brúka tíðina til.

Eitt, tað fyrsta, Sunneva gjørdi, tá avgerðin var tikin um at fara frá, var at melda seg til eitt kór. Hetta hevur hon altíð havt hug til, og í heyst verða hon og ein vinkona at hoyra í Morgunkórinum.

Joga dámar Sunnevu eisini væl, og so er ikki at gloyma baldýringina: Hilmar Leon skal hava føroyskan búna at fara í, tá hann verður studentur komandi ár.

Harafturat lovar Sunneva tíbetur eisini, at hóast hon er farin úr nevndini, vil hon fegin átaka sær uppgávur til tess at lætta um hjá verandi nevnd.

Hon sigur seg hava havt so sera nógvar góðar løtur í H71, og hevur kent eitt takksemi frá fólki, at hon hevur staðið fyri felagnum.

– Eg búgvi jú framvegis í Hoyvík og eri góð við fólkið, her býr. Tú kanst á ein hátt siga, at hjá mær er tað Hoyvík áðrenn H71 og Hoyvík aftaná H71!

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



Vit hava deilt vinningin millum
allar kundar okkara í 50 ár
– og tí halda vit fram við

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo



Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN




# Góðir starvsfelagar skapa góð úrslit

"Eg eri vísur í, at tað er góði starvsandin, sum skapar góðu úrslitini hjá Marine Harvest"

*Fjalar, alari í Oyndarfirði*

Marine Harvest strembar eftir at skapa bestu liviumstøður fyri laksin. Vit tryggja okkum, at laksurin er heilsugóður matur. Vit arbeiða í góðum samljóði við umhvørvið og við ábyrgd fyri samfelagnum. Marine Harvest vil vísa vegin til alsamt størri burðardygd.

LAIDERZ
*Better in the long run*






VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI
Alt til
HITA
SANITET &
VENTILATIÓN
Maria Poulsen & Co
Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000


w.kondi.dk
FAXE
KOND
MED DRUESUKKE


Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Myklinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909



...bert hugflogið
setur mørk!

OKKARA NÝGGJA SKERIMASKINA

# HUGSA STÓRT

Við nýggju skerimaskinu okkara kunnu vit nú bjóða hesa slóðbrótandi framleiðslu í Føroyum.
Útskorin skelti, stavir, samansetingar og standarar úr flest øllum tilfari og tjúgdum.

**Ja, nú ber veruliga ALT til – Hugsa stórt, hugsa Føroyaprent!**

Ring tel. 314555 og hoyr nærri
www.foroyaprent.fo

Føroyaprent



www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik

# STÓRSTEYPADYSTURIN VÍF-H71

## SUNNUDAGIN 4. SEPTEMBER FINGU VIT FYRSTU SMAKKROYNDINA AV NÝGGJA HONDBÓLTSÁRINUM 2016/17, TÁ MEISTARARNIR ÚR VESTMANNA SPÆLDU MÓTI STEYPAVINNARUNUM ÚR HOYVÍK, Í EINI NÆRUM FULLSETTARI ÍTRÓTTARHØLL Á HÁLSI Í HAVN

Sum vanligt eru altíð broytingar. Hjá VÍF vóru fleiri av profilunum frá í fjør ikki við. Verjukempurnar Sámal og Heini spæla ikki meira og tað sama við dugnaliga strikuspælaranum Agnari Nielsen. Stórskjúttin Áki Egilsnes og málmanninum Niclas Simonsen eru hinvegin ikki givnir, men hava leita sær uttanlands í lestrarørindum og nýggjum hondbóltsavbjóðingum. Hetta kann kallast týðandi broytingar og fyri at bøta um støðuna, so hevur VÍF fingið fyrrverandi kyndlamálmannin Mladen at koma at leika við VÍF, eins og somuleiðis fyrrverandi neistastrikuna Jugoslav Jumic.

Hjá H71 sóust eisini ymiskar broytingar í mun til í fjør. Tóraldur Kollsker er farin til Danmarkar í útbúgvingarørindum og í hansara stað var komin xxxx. Á vinstra vongi sást aftur Bogi Davidsen, og fleiri ungir leikarar sótu á útskiftingarstólunum. Mark Marcher, sum hevur haft ein stóran leiklut í góðu gongdini hjá H71 seinastu tvey árini, kemur helst ikki at virka sum leikari í ár, men meira sum hjálparvenjari hjá nýggja venjaranum Sonne Larsen.

Dysturin sjálvur var leikliga javnur í fyrra hálvleiki, har H71 tó hevði leiðsluna fyri tað mesta. Hálvleiksstøðan var10-9 til H71. Í seinna hálvleiki, og serliga móti endanum gjørdist munurin greiður og H71 vann dystin við seks málum, og úrslitið gjørdist 25-19. Ein rættiliga greiður sigur.

Úrslitið í sær sjálvum hevði ongan týdning, uttan tað at H71 ognaði sær enn eitt steyp afturat, og at ein sigur altíð er góður fyri sjálvsálitið. Hinvegin so ber til at gera sær fyrstu tankar um styrkir og veikleikar og hvussu árið man fara at hilnast hjá hesum báðum liðum.

Hjá VÍF sást sjónliga at spælstílurin var broyttur. Áki Egilsnes er ikki við meira og VÍF-liðið var sjónliga vongskorið, nú sterki og



vælskjótandi bakkurin var burtur. Liðið hevur sostatt bara Filip, ið kann kallast langskjútti, og hetta broytti liðið til at spæla kvikari spæl inn móti verjuni. Í verjupartinum var talan um stórbroytingar, Sámal og Heini eru høgir á vøkstri og vóru sum ein múrur fyri málinum. Teir eru ikki longur og múrurin er ikki líka høgur, og lættari er at tí skjóta. Evnaríki málmaðurin Niclas Simonsen var ofta ringur at koma framvið hjá H71-skjúttunum, og í hansara stað var komin Mladen, sum helst ikki hevur vant seg við vestmannaverjuna enn.

Hjá H71 var eyðsæð at leikararnir vóru blivnir eitt ár eldri, og bæði sjálvsálit og árraði búnaði munandi. Í álopspartinum ber til at siga at H71 nú hevur fingið munandi skotstyrki á báðum bakkplássunum, og harvið loyst ein trupulleika, ið H71 hevur drigist við leingi. Í fjør fingu vit Peter Krog at spæla á vinstra bakki og í ár hava vit so fingið Hilmar Leon á høgra bakk. Hilmar Leon vísti serstakliga gott spæl. Sostatt hava vit nú tveir skjúttar, sum megna at skora mál útifrá, nakað sum kann broyta spælistílin hjá H71 munandi. Hetta sást eisini aftur við tað at vengurnir fingu lítið burturúr, helst tí at spælið mest gekk um miðjuna. Góða úrslitið hjá H71 var ikki bara tengt at bakkunum, men sanniliga eisini at sera vælleikandi Ára Dam, ið málinum.

Samanumtikið sýntist H71 at vera betur fyri enn VÍF, og spennandi verður at síggja um hetta kemur at síggjast í kappingini, ella um dysturin sunnudagin ber var eitt støðubílat, sum ikki hevði nakað at siga.



# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN



## LEIVUR MORTENSEN

D18

**Aldur?**
– 17 ár.

**Hvørjum plássi spælir tú á?**
– Vinstri vongur.

**Hvør á liðinum hjá tær er stórsta drama-queenin?**
– Niklas Højgaard.

**Hevur vánaligasta tónleikasmag?**
– Hans Kári Hansen.

**Hvørjum torir tú ringast at koyra við til dyst?**
– Bergur Ákasaon.

**Hevur flottastu reyv?**
– Ólavur Joensen.

**Er festligast at vera í brúsu saman við?**
– Tað má nokk vera John Andor.

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
– Tá eg skoraði tað avgerandi máli í einum umráðandi dysti í Danmark, tá bert 2 sekund vóru eftir.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
– Havi ein playlista eg lurti eftir áðrenn eg skal spæla dyst.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
– At vera á hondbólts-eftirskúla í eitt ár.

**Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
– Hallów góða.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltssøgu at fortelja?**
– Ja, tá Petur Dahl misskilti venjaran og rann suicide undir steypafinaluni, frá útskiftingar bonkinum og inná vøllin nakrar ferðir.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
– Heilt klárt saman haldi.

**Hvønn skal eg spyrja næst?**
– Vilhelm Poulsen.


HANDLA
Ein heimur fyri seg av
tilfari til skapandi sálir
01
GLOSSY
www.handla.fo

# VÆLKOMIN Í VEITSLU, GÓÐU H71 ARAR, STUÐLAR OG VITJANDI

## NÚ FELAG OKKARA VERÐUR 45 ÁR, HAVA MONG OKKARA ÓIVAÐ LITIÐ AFTUR UM BAK TIL BARNA- OG UNGDÓMSÁRINI Í HOYVÍK OG TIL DAGARNAR NIÐRI Í HOYDØLUM, SUM VAR NÝTTUR TIL LEIK OG SPÆL

Sjálv havi eg hesar dagarnar hugsað um søgurnar hjá Karstini Hoydal, sum snúgva seg um tíðina í dalinum og um yrkingina "ganga nú á meg minnini" ein yrking hann skrivaði til pápa sín, tá hann var blivin vaksin. Sjálvt um Karstin vaks upp í Hoydølum ta tíðina, tá tuberklasjúklingar búðu á Sanatoriinum og sostatt upplivdi ta døpru tíðina í dalinum, so hevði hann eisini nógvar góðar løtur í dalinum fagra, sum hann kallaði dalin. Hann yrkir soleiðis um dalin fagra:

Men sólskinsdagar við grønum bø
bjartir í minni branda,
teir róku burtur úr huganum
deyðaótta og vanda,
tá varð mín dalur eitt paradís,
har ljóst var og lætt at anda

um somu tíð, sum unglingarnir í Hoyvík gingu við tonkunum um, at stovna eitt ítróttarfelag fyrst í 70 unum gekk eg sum lítil smágenta í



Røðan, sum Sunneva Jakobsen helt, til 45 ára føðingardagsveitsluna hjá H71 hin 14. mai 2016 í stásiligu kantinu okkara í Hoyvíkshøll.



einum heilt øðrum føgrum dali og kendi onki til hvørki Hoyvík ella nakrar tankar um H71, men eg hevði tó óivað hoyrt um Karstin Hoydal og hansara søgur

Upprunan hjá H71 eru tað helst onnur í vita meira um enn eg og fara tit óiva at hoyra meira um hetta seinri...

*Framhald á síðu 37*

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

SENDISTOVAN



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.

Fríða Patursson, adv.

Óla Jákup Kristoffersen, adv.

Christian Andreasen, adv.

Niels Winther Poulsen, adv.

Eyðbjørn Larsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN

TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!




NORÐOYA SPARIKASSI

Orkulán 2,5%

- Bústaðarlán við lágari rentu

**Bílegg eitt kundaprát**
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum skatti

Afturrindan av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com

Hóast eg nú havi búð í Hoyvík í skjótt 24 ár, so kenni eg meg at verða tilflytara til Hoyvíkar, veruliga kenni meg enn at verða ein dalbing, eisini sjálv um eg bert búði í Dali í 16 ár.

Trúgvi eisini at nógvir tilflytarar saman við mær, hava tað nakað á sama hátt, men tað vísir bara, hvussu nógv upprunin hevur at siga fyri okkum sum menniskju. Tíbetur hevur H71 nógv upprunafólk, sum eru dýrgripar fyri felagið, tit løgdu lunnar undir hondbóltin í Hoyvík og eiga lívið í honum og tað vil eg her takka tykkum fyri. Men nýggju hoyvíkingarnir ella tilflytararnir – hava sanniliga eisini givið sítt íkast og sett sín dám á felagið, saman bera vit felagið framá.

Tá eg fyri 10 árum síðani gjørdist forkvinna í felagnum, hugsaði eg ikki so nógv um hetta við integriteti, men, sum yrkjarin skrivar - tíðirnar broytast og eg broytist við - men eg vil siga, at við H71 kenni eg meg meira gróðursetta í Hoyvíkini

Í H71 seta vit bara- og ungdómsarbeiðið høgt og meta vit í nevndini, at hetta er viðvirkandi til, at børnini og tey ungu trívast í felagnum. H71 er vaksið tey seinastu 10 árini til eitt felagið við yvir 400 aktivum limum og hetta krevur ein vælvirkandi felagsskap við nógvum drúgvum sjálvbodnum arbeiði, og tað hava vit í H71. Vit hava eina dugnaliga og vælvirkandi nevnd, sum arbeiðir fyri alt felagið, vit hava nógvar og góðar venjarar og hjálparvenjarar og eina rúgvu av hjálparfólki, sum altíð eru klár at heita á, ongin nevndur ongin gloymdur.

Tað er onki at ivast í, at alt tað sjálvbodna arbeiðið, sum verður gjørt runt um í landi okkara, børnunum og teimum ungu at frama, er gull vert fyri samfelagið. Og ein góðan part av hesum sjálvbodna arbeiðinum eru tað tit góðu






stuðlar, hjálparar leikarar og foreldur leggja í felagið og felagsskapin.

Hoyvíkshøllin broytti hondbóltin sjónliga og má sigast, at høllin gjørdist ein hornasteinur undir hondbóltinum í Hoyvík. Í høllini búleikast dagliga, undir kønari hond av venjarum og hjálparfólki, ein ørgrynna av børnum og ungum til venjing, leik og spæl. Fyri kortum fingu vit afturat eina snotiliga kantinu, sum eisini er viðvirkandi til enn betri arbeiðsumstøður – og hon verður eisini karmur um veitsluna í kvøld.

Vit líta aftur á tíðina ið fór við stórum takksemi og eyðmjúkleika , fegnast um stóra framgongd, nógvir íðkarar, nógv gull, nógvar góðar løtur og nógva sjálvbodna orku.

Fyri at taka samanum, so eru 45 ár liðin síðani unglingar í Hoyvík runni til leik og spæl niðri í dalinum fagra og gjørdu sær tankar um at stovna eitt ítróttarfelag í Hoyvík, um hvussu fastur upprunin verður gróðursettur, at H71 hevur vaksi seg til eitt felag við 400 aktivum limum, at vit í H71 hava nógva sjálvbodna orku og nøktandi karmar og fari eg at enda við teimum 4 seinastu reglunum í ítróttarkvøðuni hjá Janusi Djurhuus

Nú er tímin til ítrótt og spæl-
Lívsins vártíð og summarstund sæl
Nýtum vakurt og væl,
So hon verður eitt stimbrandi minni

Til allarseinast fari eg at ynskja okkum øllum hjartaliga til lukku við 45 ára stovningardegnum hjá H71 og fari eg her at biðja tykkum rópa eitt trý falt hurrá fyri H71.

## H71

1 Ári E. **Dam**
12 Elberg Elias **Klettheyggj**

4 Rúni **Vest Højgaard**
5 Bogi **Gaard Davidsen**
6 Leivur **Mortensen**
8 Pætur **Thomsen**
11 Hans Kári **Hansen**
14 Sigmundur **H. Dahl**
15 Sigmundur **Nolsøe**
18 Andor **Sivertsen**
22 Helgi **Hoydal**
23 Hilmar Leon **Jakobsen**
45 Peter **Krogh**
73 Dánjal **Tórgarð**
89 Jónas **G. Djurhuus**
99 Tróndur **Arge**

**Venjari:** Sonni D. V. Larsen
**Hjálparv.:** Mark Lausen-Marcher

**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Styrkivenjari:** Heri Ziska **Liðleiðari:** Petur Sivertsen
**Fysioterapeutur:** Bartal Dahl Andreassen

## TEAM KLASVÍK

12 Aron **Kallsberg Jacobsen**
16 Rasmus **Sommer Magnusson**

3 Einar **Dam**
9 Birgir **Poulsen**
10 Jacob **Knudsen**
14 Martin **Joensen**
15 Beinir **Johannesen**
17 Aron **Garrdlykke Joensen**
18 Petur Martin **Eliasen**
20 Finnur **Hansson**
22 Vilhelm **Vilhemsen**
23 Andrias **Ellingsgaard**
27 Jóhann Julius **Finnbogason**
66 Hanus **Norðberg**
88 Jens Pauli **Mohr**
99 Sonni **Knudsen**

**Venjari:** Finnur Hansson
**Hjálparv.:** Heri Johnsson

**Liðleiðari:** Sámal á Tjaldrafløtti Olsen

## Dystaryvirlit hjá H71 í FTZ-deildini:

| | |
|---|---|
| 18.09.2016 | **H71** - Team Klaksvík |
| 21.09.2016 | StÍF - **H71** |
| 25.09.2016 | **H71** - Kyndil |
| 06.10.2016 | Neistin - **H71** |
| 08.10.2016 | KÍF - **H71** |
| 16.10.2016 | **H71** - VÍF |
| 26.10.2016 | Team Klaksvík - **H71** |
| 30.10.2016 | **H71** - StÍF |
| 02.11.2016 | Kyndil - **H71** |
| 06.11.2016 | **H71** - KÍF |
| 13.11.2016 | **H71** - Neistin |
| 27.11.2016 | **H71** - Kyndil |
| 11.12.2016 | VÍF - **H71** |
| 14.12.2016 | **H71** - Team Klaksvík |
| 17.12.2016 | StÍF - **H71** |
| 26.02.2017 | **H71** - KÍF |
| 01.03.2017 | VÍF - **H71** |
| 08.03.2017 | Team Klaksvík - **H71** |
| 12.03.2017 | **H71** - StÍF |
| 19.03.2017 | **H71** - Neistin |
| 25.03.2017 | Kyndil - **H71** |
| 01.04.2017 | Neistin - **H71** |
| 09.04.2017 | **H71** - VÍF |
| 15.04.2017 | KÍF - **H71** |

## Støðan í FTZ-deildini:

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 2 | Kyndil | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **3** | **H71** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| 4 | VÍF | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | KÍF | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 | Team Klaksvík | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 7 | StÍF | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |

J&K

## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J&K

**J & K Betong**

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · JULIANNA KLETT